# Millumgonga/megling – ein øðrvísi trætuloysn

Í døgunum **15. og 16. november 2001** verður skipað fyri byrjanarskeiði í millumgongu. Skeiðið verður á Hotel Hafnia. Við 20 luttakarum, sum er mesta talið, verður kostnaðurin kr. 3.800,-.

Millumgonga, ella **mediatión**, er ein arbeiðsháttur, sum í stuttum snýr um at loysa ósemjur so, at báðir/allir partar kenna seg sum vinnarar. Tey stríðandi verða eggjaði til at skilja fyrimunin við sjálvi at tosa seg til rættis og samráðast, heldur enn við krøvum og ákærum at økja um ósemjuna. Mediator leggur seg ikki út í sjálva ósemjuna ella kemur við uppskotum um loysnir, men stýrir tingingunum partanna millum soleiðis, at partarnir sjálvir koma við uppskotum um loysnir og velja ta loysnina, sum teir halda vera tað bestu. Sleppast kann tá ofta undan rættarmálum, sum ongantíð áttu at verið byrjað.

Hesin arbeiðsháttur hevur víst seg sum eitt sera effektivt amboð at loysa ósemjur av alskins slag innan vinnulív, í familjurættarligum trætum, innan skúlagátt, í revsimálum og yvirhøvur á øllum økjum, og eiga eisini vit í Føroyum at brynja okkum við grundleggjandi vitan til henda arbeiðshátt, nú roknast má við, at tørvurin á vælkvalificeraðum millumgongufólkum innan leingi gerst veruleiki eisini her hjá okkum.

Á byrjanarskeiðinum, verður størstur dentur lagdur á trætur innan familjurættarliga økið, men eigur hetta ikki at halda teimum aftur, sum hava áhuga í trætuloysnum eisini innan onnur øki, tí skeiðið fevnir eisini um eina almenna og grundleggjandi vitan um, hvat mediatión snýr seg um, og um tær mannagongdir, sum nýttar vera. Á skeiðinum verður teoretisk framløga og praktisk uppgávuloysn.

Skeiðið vendir sær til advokatar, psykologar, dómarar, socialráðgevarar, málsviðgerar og onnur, sum dagliga arbeiða við trætuloysnum og semjuroyndum, umframt onnur, sum hava áhuga í hesum evni og ynskja størri kunnleika um mediatión, og hvat hon kann nýtast til. Ætlanin er seinni at hava víðkað skeið til teirra, sum ynskja fullan førleika at virka sum mediator.

Undirvísararnir, sum báðar virka sum praktiserandi mediatorar, eru:

**Dr. jur. Vibeke Vindeløv:** Útbúgvin mediator umframt psykoterapeutur. Hevur skrivað doktararitgerð um alternativa trætuloysn og undirvísir í hesum á Keypmannahavnar Universiteti. Tað er eisini her, hon er farin undir at byggja upp master-útbúgvingina innan sama øki, og

**Advokatur Pia Deleuran**: Útbúgvin mediator og universitetsútbúgvin teoretiskur pædagogur. Hon hevur nógvar royndir sum undirvísari og granskaralesandi á Granskaraskúlanum á Roskilde Universiteti í evninum "livslang læring og konflikter".

Áhugað biðjast tilmelda seg í seinasta lagi mikudagin 31. oktober 2001. Skeiðið er treytað av, at minst 10 luttaka. Kostnaðurin verður tá tilsvarandi hægri. Fyrivarni verður tikið fyri smávegis broytingum í prísinum.

Tilmeldingin er bindandi, og verður peningurin at gjalda til mín á eina av hesum konti við tilskilan "skeiðsgjald": Føroya Banka kt. nr.:100 332 3 ella Føroya Sparikassa: kt. nr.: 152 850 7.

Tilmelding hjá undirritaðu, higani eisini fáast fleiri upplýsingar um skeiðið.

**Demmus Hentze, lrs.**
**Turið Debes Hentze, adv.**
E. Jalsgøta 1, Tórshavn
Tlf.: 31 14 60 fax.: 31 81 64
e-postur: hentze@post.olivant.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3244

Navn: Sp/f M. S. Grevstur
Adressa: 730 Norðdepil

Kommuna: Hvannasunds Kommuna
Stovningardato: 01.10.2001
Viðtøkudato: 01.10.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Maibritt Sivertsen, 730 Norðdepil.
Stjórn: Maibritt Sivertsen, 730 Norðdepil.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: : Sp/f Føroyabók, v/ Victor Nielsen, Vágstún 2, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.10.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka entreprenørvirki og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 18. oktober 2001

Kristin Balle

## Tvingsilssøla

**Hósdagin 15. november 2001, kl. 9.00** verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 126, Sørvágur (AS 2-30/2001).**

Talan er um eini sethús við kjallara, stovuhædd og loft, har hvør hæddin er 50 m² og sum smb. tingbókina er grundstykki 566 m² til víddar. Sethúsini eru gjørd av timbri á grótgrund, klædd við plastikki og takt við jarni. Í stovuhæddini er køkur, tvær stovur, kamar, baðirúm gangur. Á loftinum eru 5 lítil kømur, goymslurúm og gangur. Kjallarin er allur í einum. Úthús er omanfyri húsini. Sethúsini eru bygd í 1915 og treingja til ábøtur.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Anfinn V. Hansen, adv., Bryggjubakki 22, Tórshavn, tlf. 359595 (j. nr. 2000298)**, sum kann geva nærri upplýsingar eins og avtala kann gerast við um at síggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast frá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
tann 22.10.01.




## Handverkarar

Søkt verður eftir handverkarum til timburarbeiði í Grønlandi.

J&K

**Tlf. 315060/215005**

Sosialurin Sosialurin
i
Sosialurin Sosialurin

## Handverkarar/ forskallarar

Søkt verður eftir handverkarum/forskallarum til forskallingsarbeiði í Føroyum.

J&K

**Tlf. 315060/215005**

## Sølu/Marknaðarleiðari

Eitt spennandi og áhugavert starv sum sølu- og marknaðarleiðari er leyst at søkja hjá **P/f Vónini.**

Arbeiðsuppgávurnar fevna um sølu og marknaðarføring innanlands eins væl og uttanlands.

Tann, sum settur verður, má m.a. vera kønur í norðurlendskum og enskum máli, vera vanur við telduarbeiði og eiga at vera førur fyri at leggja søluarbeiðið væl til rættis.

Arbeiðið er sera spennandi, fjølbroytt og sjálvstøðugt, og í sera góðum arbeiðsumhvørvi.

Lønarviðurskifti og setanartreytir verða avtalað við leiðsluna.

Umsókn, saman við møguligum prógvum, eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. november.

**P/F Vónin**
Bakkavegur 22
Postboks 19
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444246

**P/F Vónin**
Álaker
FO-100 Tórshavn
Tlf. 354391



**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Lønar- og Starvsfólkadeildin*

# Leiðsluskrivari

Starvið sum leiðsluskrivari á kirurgiska deplinum er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt ella eftir avtalu.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- skrivari hjá leiðsluni í kirurgiska deplinum við tilvísing til leiðandi yvirlæknan og yvirsjúkrasystrina
- fíggjarstýring
- samskipari hjá leiðsluni v.v. starvsfólkafyrisiting og útbúgving
- fyrisitingarligt arbeiði so sum brævaskifti, journalisering v.m.
- bindilið millum sjúkrahúsleiðsluna og depilsleiðsluna

**Krøv til umsøkjaran:**
- skrivstovufólk við handilsskúlaprógvi
- ella læknaskrivari við góðkendari útbúgving og útbúgving innan skrivstovuyrkið
- evni til at raðfesta og planleggja arbeiðið
- góður edv-førleiki
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- førleiki í føroyskum og donskum bæði skrivliga og munnliga
- góð samstarvsevni og tænastuhug
- góður røkjuskapur

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt fjølbroytt starv
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Starvið er í løtuni flokkað í 20. lønarflokki.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ceciliu Vestureið, yvirsjúkrasystir á tlf. 31 35 40, lokal 129 (L), har biðjast eisini kann um eintak av starvslýsingini, ella til leiðandi yvirlæknan, Johan P. Davidsen, lokal 248 (L).

**Umsóknarfreistin er 7. november 2001 kl. 12.00**

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn




petur & petur • 320870



# Ferðist bíliga á jólum

**Føroyar - Keypmannahavn og aftur *)**
Fyri hvønn
**1500,-**
+ ferðaavgjøld kr. 365,- pr. pers
**Børn 2-11 ár: -50%**

**Føroyar - Billund og aftur *)**
Fyri hvønn
**1500,-**
+ ferðaavgjøld kr.403,- pr. pers.
**Børn 2-11 ár: -50%**

**Bíligir ferðaseðlar úr Føroyum frá Maersk**
Frá 10. desember til og við 6. januar 2002 ber til at ferðast við flogfari millum Føroyar og Danmark, bíliga sum ongantíð. Einastu treytir, at fáa bíligar ferðaseðlar, eru vanligar apex-treytir. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

**) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag.*

MAERSK AIR

# Skála kvøldskúli

Vegna ov lítla undirtøku er freistin fyri tilmelding longd eina viku og bjóða vit í vetur hesi skeið:

**TELDULÆRA:**
Týskvøld kl. 19.15.
Lærari: Jens M. Rasmussen, tlf. 442198.

**KVINNUFIMLEIKUR:**
Hóskvøld kl. 18.30. (Havið undirlag við).
Lærari: Guðrun M. Hansen, tlf. 441732 ella 211732.

**GUITARSPÆL:**
Tíð eftir avtalu.
Lærari: Esben Jacobsen, tlf. 441043 ella 254329.

Tilmelding kann eisini fara fram á tlf. 441539 ella á teldupostadressuni: skalask@post.olivant.fo. Tilmeldingarfreistin er leygardagin 27. oktober.

Luttøkugjaldið er 300 kr, sum verður goldið, tá byrjað verður.

Øll undirvísing fer fram í skúlanum, og byrjað verður í viku 44. Skeiðini eru treytað av nóg stórari luttøku.

**Skála kvøldskúli**

Sosialurin
Sosialurin
i